16 ára gamal datt av 6,5 metra høgum taki:

»Eg trúði, eg fór at doyggja...«

Seinasta sunnukvøld kundi ein vanlukka verið hend í Vestmanna, tá ið 16 ára gamli, Hans Fríðálv Johannesen, datt hálvan sjeynda metur í fríum falli.
- Áðrenn eg fór út av glerstoytta takinum, royndi eg at taka í okkurt á vegnum, men tað var vónleyst, sigur drongurin, sum eins væl kundi verið deyður í stóra fallinum

VANLUKKA
Vilmund Jacobsen

Tað var heppið fyri Hans Fríðálv Johannesen, at hann ikki rakti betongkantin í 6,5 metra høga fallinum út av takinum. - Tað hvítnaði fyri mær, tá ið eg rakti vøllin, sigur hann

Mynd: Jens Kristian Vang

Teir vóru til stuttleikar farnir ein túr uppá takið um útvarpstíð seinasta sunnukvøld, 16 ára gamli, Hans Fríðálv Johannesen og vinmaðurin og javnaldurin, Bjarni Durhuus í Vestmanna.

Omanfyri húsini gongur takið so lágt, at til ber at stíga uppá, men niðanfyri er hæddin hálvan sjeynda metur.

- Eg ætlaði at ganga oman á niðara enda á takinum, sum er meira slættur. Tað var myrkt, og eg visti ikki, at har var glerstoytt, tí tað var tað ikki í hinum endanum. Eg gleið í glerinum og fór eftir rygginum oman eftir takinum. Royndi at taka fast í okkurt á vegnum, men tað var vónleyst. Beint áðrenn eg fór út av, setti eg meg upp, soleiðis at eg fór lodrættur út av, við beinunum fyri.

Hans Fríðálv minnist, at tað hvítnaði fyri sær, tá ið hann í stóra fallinum rakti vøllin undir húsunum.

- Eg var ongantíð veruliga burtur, men tað mundi vera nær við.

Tað var høgri fótur sum tók, og Hans Fríðálv datt harðliga niður á høgru lið í brestinum.

Trúði, eg fór at doyggja..."

Men hvat hugsaði so hesin 16 ára gamli drongurin í høga fallinum?

- Eg hugsaði, at nú fór eg at doyggja, tí eg visti, at høgt var oman av niðanfyri, rættiliga høgt.

Spurdur, um hann hugsaði um foreldur og systkin, sigur hann, at alt hendi so ógvuliga knappliga, at stundir vóru ikki til teir nógvu tankarnar.

- Men eg væntaði ikki at koma livandi frá tí, ið bíðaði mær í hesi løtu, sigur hann rørdur á málinum.

Tá ið Hans Fríðálv lá niðri á vøllinum, hevði hann ilt í høgra fóti og høgra armi.

- Tá ið eg hevði ligið har nakrar minuttir, tók eg við vinstru hond um høgra arm, og tá føldi eg, at ein stór kúla stakk burtur úr arminum, omanfyri albogan.

Hans Fríðálv heldur sjálvur, at hann slapp ógvuliga væl burtur úr hesum, og hann sigur seg hava hugsað nógv um, hvat kundi verið hent, um eydan ikki hevði verið við honum henda dagin.

- Var eg ikki so heppin í óhappinum, kundi eg eins væl verið deyður, er hann sannførdur um.

"Joan, Joan..!"

Joan Poulsen, sum býr saman við Gert Johannesen, ið er pápi Hans Fríðálv, sigur, at hon var einsamøll inni saman við tveimum børnum, tá ið Bjarni Durhuus kom rennandi innar og rópti:

"Joan, Joan - kom her, Hans Fríðálv er dottin av takinum...!"

Eyguni á Bjarna vóru sum tekoppar; hann var óttafullur, men hevði fyrst verið niðri hjá Hans Fríðálvi, áðrenn hann fór eftir Joan.

Gert var í Havn, og hann visti ikki, hvat var hent, fyrr enn læknin hevði verið á staðnum.

- Eg væntaði tað ringasta, tá ið eg fór oman undir húsini. Har lá Hans Fríðálv - var klárur, men hevði ógvuliga ilt í fótinum og arminum.

Joan sigur, at tað var ein lætti at síggja, at drongurin var livandi og klárur, og at hann kundi flyta beinini. Men hann kundi ikki reisa seg.

- Tá ið hann kundi flyta beinini, var hann ikki lammaður, og tað var ein stór troyst, hugsaði eg.

Hon ringdi beinanvegin til læknan, men hann svaraði ikki, tí hann hevði ikki vakt.

- Læknin býr beint oman fyri, so eg fór á dyrnar og bankaði uppá. Læknin kom beinanvegin á staðið. Hann kannaði dreingin og helt, at hann var sloppin við einum broti á høgra armi. Ráðiligt var tó ikki at flyta hann, har hann lá, um so var, at hann hevði fingið annan skaða í høga fallinum.

Joan sigur, at hon og Bjarni vóru hjá Hans Fríðálvi at kalla alla tíðina, meðan tey bíðaðu eftir sjúkrabilinum úr Havn. Tá ið bilurin kom, fór hon suður á Landssjúkrahúsið við honum.

- Hann var ógvuliga róligur alla tíðina, sigur hon.

Sera heppin

Joan heldur, at Hans Fríðálv hevur verið sera heppin.

- Vit hava mált hæddina av takendanum og niður, og hon er hálvan sjeynda metur. Tað er eitt stórt, frítt fall.

Hon vísir á, at einar tveir metrar frá húsunum niðan fyri er ein betongkantur, men tað var so heppið, at Hans Fríðálv endaði umleið hálvan annan metur uttan fyri hendan kantin.

- Hann var í ketildrakt, og hon hevur kanska gjørt sítt til, at ferðin omanav ísklædda takinum gjørdist so mikið nógv, at hann rakti vøllin niðanfyri húsini - og ikki betongkantin, sum kundi tikið lívið av honum.

Joan sigur, at ketildraktin var við til at halda hitanum í dreinginum, meðan hann lá á vøllinum og bíðaði eftir sjúkrabilinum.

- Eg trúgvi, at gummiskógvarnir, hann var í, hava dempað stoytin nakað, tí hesir vóru so tjúkkir og stórir í tí.

Hon leggur aftrat, at hendingin rættiliga slegði í búkin á sær, tá ið læknin hevði verið á staðnum.

- Jú, eg haldi, at Hans Fríðálv var serstakliga heppin í óhappinum hendan dagin, sigur Joan Poulsen.

Hans Fríðálv Johannesen er fyribils sjúkrameldaður til 9. mars.

Eivør í íslendska grand prixnum

Leingi lá Eivør Pálsdóttir ovast á 15 teimum bestu í Føroyum saman við sínum føroyska bólki, og nú telist hon millum 15 tey bestu í Íslandi

Herfyri lógu Eivør og Clickhaze ovast á 15 teimum bestu í Føroyum og nú telist hon millum 15 tey bestu í Íslandi. Eivør er nevniliga úttikin til tað íslendska grand prixið í næsta mánaði, og vinnur hon, skal hon umboða Ísland í evropeiska grand prix'num

TÓNLEIKUR
Theodor E. D. Olsen

Tað er bara ein Eivør. Tað staðfesti ummælarin hjá Sosialinum stutt fyri jól, tá tann ungi songfuglurin úr Sýðrugøtu royndi sínar veingir á eini jólakonsert saman við sínum nýggja íslendska bólki, og nú sær tað út til, at hetta norðuratlantiska samstarvið fær møguleikan at flúgva oman yvir alt Evropa.

Tað hevur nevniliga eydnast Eivør Pálsdóttur og tónleikabólkinum hjá henni at vinna sær sess í tí íslendska grand-prix'num, sum verður hildið í næsta mánaði.

Tá Sosialurin ringdi til íslendska ríkissjónvarpið í gjár blivu tey eitt sindur kløkk og vildu hvørki vátta ella avsanna tíðindini um, at ein føroyingur skuldi luttaka í tí íslendska undanumfarinum til Eurovision Song Contest. Orsøkina til hetta søgdu tey vera, at allir bólkar í prix'num skulu hava líka stóran kjans at vinna kappingina, og tí vil sjónvarpsstøðin sjálv sleppa at syrgja fyri, at øll fáa ta somu umtaluna í fjølmiðlunum.

204 løg send inn

Tað er kortini greitt, at ein sangur hjá guitaristinum Eðvarð Lárussyni, sum spælir í bólkinum hjá Eivør, er ein av teimum fimtan sangunum, sum slapp gjøgnum tað tónlistaliga nálareygað hjá íslendska sjónvarpinum. Upprunaliga vórðu 204 sangir sendir inn til kappingina. Keldur sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at hóast sangurin, sum Eivør Pálsdóttir skal syngja, er bleytur, melodiøsur og øðrvísi enn vanligur poppur, so líkist hann ikki tí, sum vit vanliga kenna ta annars fjøltáttaðu sanagarinnuna frá. Sambært tónleikakønum innan íslendska sjónvarpið er talan ikki um eitt sokallað b-lag, men heldur um eitt typiskt a-lag, og tað má sigast at vera eitt gott skoðsmál at fáa.

Milliónir fylgja við

Sum nevnt roynir íslendska sjónvarpið at halda sera loyniligt, hvørjir sangir eru úttiknir til kappingina, og tí er torført at siga, hvørjum kreftum Eivør og nýggi bólkurin hjá henni eru uppi í ímóti. Men hetta fæst at vita í døgunum 3. til 7. februar, tá íslendska sjónvarpið sendir tey 15 fimtan løgini um sjónvarpið og tá avgerð um, ið vórðu hildin at vera best av teimum 204 innsendu.

15. februar verður so finalan hildin, og tá fáa vit so at síggja, um Eivør Pálsdóttir úr Føroyum, sum enn ikki hevur vunnið sær sess í Eurovision Song Contest, skal umboða Ísland í hesi kappingini, sum hundraðtals milliónir vanliga plaga at sita njóta framman fyri sjónvarpsskíggjanum.

Í fjør royndi Pætur við Keldu seg í danska grand prixnum, tó uttan at vinna. Danmark endaði á aftasta plássi í tí evropeiska grand prixnum seinast, men nú fær ríkiseindin so kortini onkran at halda við, um tað eydnast tí unga føroyinginum at gera seg galdandi í Íslandi.